# Vøllur undir í vatni



Í hesum døgum ber als ikki til at spæla fótbólt á Hillsborough, sum er heimavøllurin hjá enska fótbóltsfelagnum, Sheffield Wednesday. Grundin er, at vøllurin er fullur av vatni orsaka av óveðrinum í økinum, og hann hevði helst verið betur egnaður til vatnpolo. SkySports veit at siga, at vøllurin liggur undir tveimum metrum av vatni, og hetta kann oyðileggja bæði grasteppið, umklæðingarúm og onnur ting, har vatnið frá ánni Don er komið framat.

# KÍ vertur fyri Europa Cup

Kvinnuliðið hjá KÍ hevur á hvørjum ári, síðani UEFA fór undir sína kapping fyri meistaralið í kvinnufótbólti, spælt við í kappingini. Fyrsta kappingin var í 2001, og síðan hevur fleiri ferðir verið tosað um at fingið eitt av innleiðandi umførunum til Føroya. Hetta er nú eydnast, tí UEFA hevur boðað KÍ og FSF frá, at ætlanin er at leggja eina kapping í Føroyum í døgunum frá 9. til 14. august.
Umframt KÍ verða trý onnur europeisk lið við í kappingini í Føroyum. Øll spæla móti øllum, og vinnarin av innleiðandi umfarinum fer víðari í kappingini. Lutakastið til fyrsta umfar verður tann 5. juli.



Bergur Ingvardsson er 18 ára gamal og umboðar Føroyar í rifluskjóting á leikunum á Rhodos

Mynd: Álvur Haraldsen

# Føroysk rifla á Rhodos

**Fyri fyrstu ferð nakrantíð eru Føroyar umboðaðar í skjóting við riflu**

SKJÓTING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

At skjóta við riflu er bannað við lóg í Føroyum. Eisini sjálvt um talan bara er um venjing til oyggjaleikir. Kortini hava Føroyar eitt umboð í greinini rifluskjóting á ársins leikum.
18 ára gamli Bergur Ingvardsson býr í Danmark, og har er loyvt at skjóta við riflu.
– Eg kom at búgva tætt einum skjótifelag í Slagerup, og tá vinirnir fóru at skjóta har, so byrjaði eg eisini, greiðir Bergur frá. Hann hevur nú skotið í tilsamans seks ár, og hevur tað gingið væl hjá honum. Millum annað lóttók Bergur í DM í luftrifluskjóting fyri tveimum árum síðani, har hann endaði sum nummar trý.

## Skjýtur liggjandi

Men hvussu bar tað til, at Bergur endaði millum hinar føroysku skjúttarnar á Rhodos?
– Abbi mín við Norðskála fortaldi mær, at Føroyum vantaði rifluskjúttar, tí tað ikki var loyvi at skjóta riflu í Føroyum. Saman við Simma (Simme Jacobsen, blðm.) prátaðu vit aftur og fram um hetta, og samdust um, at tað hevði verið vert at roynt, greiðir Bergur Ingvardsson. Hann skjýtur eina kaliber 22 riflu, og tað er ein heldur øðrvísi byrsa, enn tær hinir skjúttarnir brúka. Eisini mátin kappast verður upp á eru ymiskir. Sum rifluskjútti liggur tú niðri og skjýtur skivur, meðan hinir skjúttarnir á túrinum standa og skjóta dúgvur.

## Krevur lógarbroyting

Hetta síðst nevnda er eisini tað mest vanliga í Føroyum, men skjúttarnir í føroyska ferðalagnum meta tó, at tað illa fær verið annað enn ein spurningur um tí, áðrenn rifluskjóting verður loyvd í Føroyum. Hetta tí, at rifluskjóting er fastur partur av oyggjaleikunum, so um føroyingar nakrantíð skulu gera sær vónir um, at fáa oyggjaleikirnar aftur til Føroya, so má hetta broytast. Og tá rifluskjóting er bannað við lóg, krevst ein lógarbroyting, um oyggjaleikirnir skulu koma aftur til Føroya.

# Svimjarar í grumsutum sjógvi

**Føroysku svimjararnir eru ikki heilt nøgdir við tær umstøður, teimum verða bjóðaðar á Rhodos**

SVIMJING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Nú eftir nakrar dagar á Rhodos, hava svimjararnir eisini royndt seg í hylinum, men umstøðurnar har eru ikki tær allarbestu. Tá vit hittu svimjararnar í morgun greiddu hesir frá, at har vóru rættiliga nógv ting, sum teir høvdu ynskt øðrvísi.
– Hatta er ein keðiligur hylur. Hann er óklárur og fullur í sandi, soleiðis at vit illa síggja meiri enn tveir metur fram, fortelja teir.
Harumframt er eingin skýggi kring hylin. Í ógvusliga hitanum kann tað gerast ótolandi hjá svimjarunum at sita í bakandi sól. Her hava svimjararnir tó fingið lovað, at tað kemur upp á pláss, áðrenn kappingin byrjar.
Hóast umstøðurnar ikki eru heimsins bestu, so fegnast svimjararnir um, at teir yvirhøvur eru sloppnir í hylin. Tí tað eru bara teir og so tey frá Isle of Man, sum eru sloppin hetta. Hini londini vóru øll ov sein at skriva seg upp til venjingar, og sleppa tískil ikki at royna seg í hylinum. Teir hava nevniliga saman við Isle of Man sum tey einastu londini skriva seg upp til venjingar áðrenn freistin var úti.